BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

6. desember 2024
Mál: 22/22133-101
Viðgjørt: TB

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-058/2024 eftir § 52a í Tingskipanini, frá Biritu Matras Petersen, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um limaskap í European Higher Education Area (EHEA) og Erasmus+.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørji stig eru framd í arbeiðinum við føroyskum limaskapi í EHEA og Erasmus+?
2. Hvat er eftir at gera til tess at fáa fullan limaskap í EHEA og Erasmus+?

Svar:

Til 1: Føroya Løgting samtykti 18. mars 2022, at landsstýrið fekk settan í gildi fyri Føroyar sáttmálan millum Føroyar og Evropasamveldið (ES) um luttøku Føroya í samstarvsætlanum Samveldisins, og tilhoyrandi frumskjal viðvíkjandi tilknýti Føroya til Horizon Europe – Rammuverkætlanin fyri gransking og nýskapan (2021-2027). Sáttmálin var undirritaður í Brússel 30. mai 2022.

Talan er um ein rammusáttmála, sum er liður í eini nýggjari skipan hjá ES fyri atlimaskap hjá triðjalondum, ið fevna um allar atlimaskapir í samstarvsætlanum hjá ES. Føroyar og ES nevndin hava í hesum sambandi samráðst um ein rammusáttmála, sum gevur Føroyum møguleika at gerast partur av øllum samstarvsskráum hjá ES, ið loyva atlimaskap fyri lond uttanfyri ES. Formliga er tí klárt hjá Føroyum at senda formliga fráboðan til ES Nevndina um, at Føroyar ynskja at fara undir samráðingar um føroyskan atlimaskap í útbúgvingarsamstarvinum Erasmus+.

Í løgtingsfíggjarlógaruppskotinum fyri 2025 er peningur settur av, sum ger tað møguligt at raðfesta økið á ein haldgóðan hátt. Erasmus+ hevur havt eina játtan á 200 t.kr., men sambært fíggjarlógaruppskotinum verður hetta hækkað við 600 t.kr., sum harvið gevur eina samlaða upphædd á 800 t.kr. Tað er eitt krav til øll Erasmus+ londini at skipa eina tjóðarskrivstovu, sum skal umsita Erasmus+ limaskapin, stuðulin og samskipa luttøkuna av Erasmus+ stuðulsskipanini. Ætlanin er at nýta játtanina til at skipa føroysku Erasmus+ tjóðarskrivstovuna, sum í fyrstu syftu fær til uppgávu at kanna, lýsa og skipa øll formligu viðurskiftini rundan um føroyska atlimaskapin. Tjóðarskrivstovan verður staðsett í Undirvísingarstýrinum.

Evropeiska økið fyri hægri útbúgvingar, EHEA, er tað man hevur valt at kalla londini, sum hava undirskrivað Bolognaavtaluna og harvið bundið seg til at skipa teirra hægri útbúgvingar og útbúgvingarskipan eftir Bolognatilgongdini. Tað vil siga, at tað arbeiði, sum hevur verið gjørt í Føroyum mótvegis Bolognatilgongdini, er tað sama, sum við EHEA. Tilgongdin í hesum arbeiði

hevur verið at nærkast krøvunum í Bolognatilgongdini mest møguligt, soleiðis at vit fáa eina lættari tilgongd, tá Føroyar formliga fara eftir at undirskriva Bolognaavtaluna.

Bygnaðarliga hava føroysku útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya verið í samsvari við EHEA síðan Seturslógin kom í gildi í 2008.

Eftirmetingin av Fróðskaparsetri Føroya, sum ein uttanhýsis serfrøðingabólkur framdi í tíðarskeiðnum 2021 – 2022, tók í stóran mun útgangsstøði í reglunum um uttanhýsis góðskutrygging sambært *European Standards and Guidelines*, ESG. Hetta eru góðskutryggingarreglurnar, sum verða brúktar í EHEA, og sum einhvør formlig akkreditering eisini hevði verið gjørd eftir.

Á Fróðskaparsetri Føroya verður miðvíst arbeitt við at tryggja innanhýsis góðskuna á útbúgvingunum á Setrinum. Hetta verður gjørt við útgangsstøði í reglunum um innanhýsis góðskutrygging í ESG, sum sostatt eisini er í samsvari við EHEA.

Tann 10. mai í ár viðtók Løgtingið lógina um tann føroyska førleikakarmin. Hesin førleikakarmurin er ein sokallaður *National Qualifications Framework*, NQF, sum er ein skipan, sum definerar støðið á útbúgvingunum, og sum ger tað møguligt at samanbera útbúgvingar tvørturum lond. Førleikakarmurin er skipaður við útgangsstøði í EQF og QF-EHEA. At førleikakarmurin er skipaður eftir EQF merkir, at hann er í samsvari við standardarnar í ES, og at hann fevnir um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum. At hann er skipaður eftir QF-EHEA, merkir, at hann eisini er í samsvari við EHEA.

Eftir er at lýsa eina kunngerð, sum nærri lýsir reglurnar fyri førleikakarmin, og har førleikakarmurin sjálvur eisini verður hjálagdur sum fylgiskjal. Tá kunngerðin er lýst, verða allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar flokkaðar inni á Kervi+.

Tørvur er eisini á at finna eina hóskandi loysn fyri tí uttanhýsis góðskutryggingina, uttan at gera eina ov tunga skipan at reka. Vanliga verður hetta gjørt við at stovna eina tjóðarskrivstovu, sum tekur sær av uttanhýsis góðskutryggingini, men møguleiki er eisini at keypa seg frá tí, so leingi talan er um ein góðkendan góðskutryggingarstovn. Hetta kundi t.d. verið umvegis tí íslendsku skipanina, ella umvegis ein ENQA/EQAR-góðkendan góðskutryggingarstovn, sum t.d. Institutional Evaluation Programme, IEP, sum arbeiðir við góðskutrygging burturav. Hetta seinna er leisturin, sum San Marino valdi, tá tey í 2020 undirskrivaðu Bolognaavtaluna og tí gjørdist limir í EHEA.

Til 2: Fyri at gerast partur av Erasmus+ skal ein tjóðarskrivstova skipast, sum í fyrstu atløgu skal fyrireika skipanina í Føroyum. Síðan er neyðugt, at Føroyar fráboða ES Nevndini, at ynski er um at fara undir ítøkiligar samráðingar um luttøku í Erasmus+ útbúgvingarsamstarvinum. Hetta til tess at kunna seta gongd á formliga samskiftið við ES um føroyskan atlimaskap í Erasmus+. Eftirfylgjandi verður ein fylgibólkur helst sendur til Føroya, sum skal vegleiða og fylgja tilgongdini.

Fyri at gerast partur av EHEA skulu Føroyar undirskriva Bolognaavtaluna. Men fortreytin fyri yvirhøvur at kunna undirskriva avtaluna er, at Føroyar eisini hava undirskrivað tí evropeisku mentanarkonventiónina frá 1954 og Lisabonkonventiónina um viðurkenning av hægri útbúgvingum frá 1997.

Danmark hevur undirskrivað báðar konventiónirnar og hevur í mentanarkonventiónini ikki sýnt Føroyum fyrilit, soleiðis at Føroyar at síggja til eru fevndar av konventiónini. Í Lisabonkonventiónini er fyrilit sýnt Føroyum, sum merkir, at konventiónin ikki er galdandi fyri Føroyar.

Tí skal greiði fáast á, um Føroyar sjálvstøðugt kunnu undirskriva konventiónirnar og síðan Bolognaavtaluna, ella um hetta verður gjørt umvegis Danmark.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður